# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar



*30. oktober fekk Marta hendan fitta lítla beiggjan. Hann vigaði 4340 gr og var 53 cm langur. Foreldrini eita Amy Martinsdóttir Müller og Eyðbjørn Thomsen og vit búgva í Sumba.*



*Henda lítla diddan var fødd 2. november, Keypmannahavn. Hon vigaði 3400 gr. og var 51 cm long. Foreldur hennara eru Elsa Bech og Archibald Andreasen.*

28. oktober fingu Katrin Hofgard Sørensen og Roy Poulsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3800 gr.

29. oktober fingu Gitte og Andras Lómstein, Toftum, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3750 gr.

30. oktober fingu Amy Martinsdóttir Müller og Eyðbjørn Thomsen, Sumba, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4340 gr.

3. november fingu Mirian og Lars Larsen, Toftum, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3450 gr.

4. november fingu Marjun Djurhuus og Eskil Vinther, Selatrað, ein son. Hann var 52 cm langur og vigaði 3625 gr.

5. november fingu Mathilda K. Svøðstein, Klaksvík, og Niclas F. Justinussen, Àrnafirði, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigði 3250 gr.

Tann 5. nov. 2005 fingu Anna Malena Gilstón og Said El Moustage, Keypmannahavn eina fitta dóttur, hon vigaði 4828 gr. og var 57 cm long.

8. november fingu Rakul og Michael í Lágabø, Vági, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3334 gr.

8. november fingu Else og Hanus Sjúrðaberg, Leirvík, eina dóttur. Hon var 45 cm long og vigaði 1955 gr.

9. november fingu Guðrun M. Johannesen og Dánjal Petur Johansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm long og vigaði 4840 gr.

9. november fingu Ata W. Høgnadóttir og Heini Harryson í Århus ein son. Hann vigaði 3350 g og var 53 cm langur.

11. november fingu Lena Reinert og John Mikkelsen, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3000 gr.

## Gull-brúdleyp



Sunnudagin 13. november hava Elinborg og Osmund Joensen í Sandavági verið gift í 50 ár.

Tey eru bæði uppvaksin í Sandavági og hava búð har alt sítt lív, burtursæð frá nøkrum árum í Havn í sekstiárunum.

Mamma er elst av 6 systkjum, og er dóttir Thor Nielsen, Thor hjá Skómakaranum, og Jóhonnu Simonsen, hjá Hans uppi í Húsi. Thor var skipari við m.ø. "Doceu" sum hann átti saman við brøðrunum John og Zacharias Nielsen. Hini systkini vóru Sverri (deyður), Hans Arne, Ella, Marita í Skálavík (nú Glyvrar) og Høgni í Sørvági.

Pápi er eisini elstur av 4 systkjum, sonur Niels Joensen úr Sandavági og Olgu Petersen úr Sørvági.

Hini systkini vóru Knút, Finn og Ingerð (deyð). Tey gjørdust tíðliga móðurloysingar, tí Olga doyði av nátasjúku, stutt eftir at Ingerð var fødd. Tá var pápi einans 7 ára gamal, og tey eru tí uppvaksin hjá fastrunum Siggu Mariu og Martinu, ið báðar vóru ógiftar. Pápi var tó nógv í húsinum hjá Eliesari og Stranda-Nicolinu, ið helt hús hjá honum og børnum hansara, Elsu Amaliu, Sigvaldi og Ludvíki. Hetta var mestsum hansara barnaheim, og mangan góðan bita fekk pápi har í húsinum, og ofta hava vit hoyrt um, tá hann slapp at súpa róman oman av mjólkini hjá Gummu.

Sum ung genta var mamma í Klaksvík og lærdi at seyma, og hetta hevur óivað komið henni væl við. Tí alt sítt lív hevur henni dámað sera væl at fingist við alt handarbeiði, bæði at binda og at brodera. Men serliga hevur tað verið seymimaskinan, sum hon hevur havt størstan tokka til.

Sum elst av 6 systkjum var óivað nógv at taka hond í heima við hús. Kúgv var í hvørjum húsi tá á døgum, og hóast tað var vanligt at hava arbeiðskonu í skiparahúsunum, máttu tey eldru børnini sjálvandi hjálpa til við teimum yngru systkjunum, eins og tey máttu reka neytini, mjólka og so framvegis.

Óvist er um tað var hetta raska lyndið, ið var orsøk til, at drongurin úr grannahúsunum bar fram bónarorð um skiparadóttrina. Men hvussu var og ikki, so giftust tey 13.november í 1955 , og settu búgv Norði í Forunum tey kalla, skamt frá kirkjuni. Tey fingu tríggjar synir, Osvald og Egon, sum búgva í Havn og Jónsvein í Svendborg. Tey fyrstu árini arbeiddi mamma í fiski í Sandavági, kanska mest í Turkihúsinum hjá Zacharias Nielsen, pápabeiggjanum.

Pápi var sjómaður og sigldi sum skipari við m.ø. "Sjóløvuni". Men eftir at hava verið á sjónum í 16 ár, mátti hann leggjast uppi vegna ryggskaða, og fara til Havnar á Læraraskúla. Familjan búleikaðist so í Klokkaragøtu í Havn, í kjallaranum hjá Torgerð og Jógvan Jensen tey 4 árini útbúgvingin vardi.

Her kom seymikynstrið hjá mammu rættuliga at standa sína roynd. Tí nú var eingin inntøka uttan tað, sum hon kundi forvinna við seymimaskinuni. Hon var so heppin at gerast seymikona hjá Skálabúðini í Havn, hagani hon fekk klæðir og gardinur heim til hús at seyma ella broyta. Hetta lá sera væl fyri, soleiðis at kunna arbeiða heima, og kortini klára at forsyrgja familjuni. Tað var heldur ikki sørt, at pápi sat við seymimaskinuna okkurt kvøldið. Hesi árini í Havn seymaði mamma eisini hjá Júst Lindberg skræddara í Villumsgøtu.

Tá útbúgingin var liðug í 1966, flutti familjan vestur aftur til Sandavágs, og pápi fekk lærarastarv við skúlan á Giljanesi. Tað kann kanska tykjast løgið, men besta lærugrein hansara gjørdist týskt, hóast hann aldri hevði havt týskt fyrrenn á Læraraskúlanum, sum tá helt til í Gróthúsinum á Vaglinum. Týskt mál var eisini orsøkin til, at hann eitt skifti var í Prien í Týsklandi á málskúla.

Tá familjan flutti vesturaftur, var farið í holt við at smíðja loftið í húsunum. Tað hevur altíð ligið væl fyri hjá honum at smíðja, og tað var skjótt, at hann innrættaði alt loftið mestsum einsamallur. Eisini tá íbúðin í kjallaranum hjá okkum varð gjørd í áttati árunum, var hann fastur og fúsur.

Í 1966 var eisini brúk fyri seymikonum í Sandavági, og mamma var í fleiri ár, saman við øðrum, seymikona á Skinnvirkinum hjá Vilhelm Nielsen, ein annar av pápabeiggjunum. Í dag høvdu hesar kvinnur verið róptar "designarar" ella sniðgevar, men tá vóru tær bara seymikonur.

Eitt annað handarbeiði má eisini nevnast, og tað er tey føroysku klæðini. Henda áhuga fekk hon frá mammu síni Jóhonnu, sum dámdi væl at gera føroysk klæði, kanska serliga mannfólkabúnan. Mamma hevur eisini fingist við at gjørt føroysk klæði, um ikki í so stóran mun sum omma.

Vit beiggjarnir við konum og hennara ommubørn, sum nú eru 9 í tali, hava havt stóra gleði og nyttu av teimum pløggum, sum eru komin úr hennara hond millum ár og dag.

Á heysti 2003 hildu vit, at nú var seymingin løgd á hillina, tí tá var mamma rakt av eini heilabløðing. Men treisk sum altíð, hevur hon vunnið sær so nógvan førleika aftur, og er so sjálvstøðug, at hon nú bæði gongur til handils, bakar og mangt annað.

Síðan pápi í 1992 fór frá sum lærari, 65 ára gamal, hevur hann dugað sera væl at fingist við ymiskt handaligt arbeiði. Til dømis hevur hann bygt fleiri modellskip, skorið út í træ og annað. Eisini hevur hann gingið á telduskeið, og skrivimaskinan er langt síðan skift út við farteldu, printara og skannara. Gamaní at onkur søga hvørvur av og á, serliga í fyrstani, men tær plaga at koma aftur í aftur, úr teldudýpinum.

Vit vilja á henda hátt ynskja tykkum hjartaliga tilukku við gullbrúdleypsdegnum, og ynskja tykkum báðum nógv góð ár framyvir og Guðs signing.

**Osvald við familju**

## Dagurin

**12. november. Torkil.** Teir vita ikki um nakað halgimenni við hesum navni, men tað er komið við í danskar álmanakkar frá 1725. Navnið er norrønt og er samansett av gudsnavninum Tórur, og Ketil, sum merkir *hattur* ella *hjálmur*.

**13. november. Arcadius,** deyður ár 437. Aðalborðin maður, sum var í fylginum hjá vandalakonginum Geiserik. Tá ið tað kom upp, at hann var kristin, varð hann tikin av døgum.

**14. november. Fríðrikur.** Hildið verður, at her verður sipað til ein biskup í Utrecht, sum varð myrdur av leigudrápsmonnum í 838. Keisarinnan Judita hevði sent teir, av tí at Fríðrikur hevði roynt at fáa keisaran til at skiljast frá henni. Navnið er tað upprunaliga gotiska *Fripareikes*, og merkir *friður og harri. Johan Henrik Schrøter doyði hendan dagin í 1851.*